## Fleiri missa hús og heim

Í Danmark enda altsamt fleiri mál um skuld í fútarættinum, og altsamt fleiri fólk noyðast frá húsi og heimi, skrivar Politiken mánadagin. Blaðið skrivar, at tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár viðgjørdi fútarætturin meiri enn 105.000 mál um ógoldnar rokningar, og tað er 36 prosent meiri enn somu mánaðir í 2008. Búskaparfrøðingurin Kim Valentin sigur við Politiken, at fíggjarkreppan er høvuðsorsøkin til gongdina. Hann vísir á, at nógv fólk missa arbeiðið og eru tí ikki før fyri at rinda sínar rokningar. Tey enda so í fútarættinum, og vil illa til, kunnu tey enda úti á gøtuni, skrivar Politiken.



## Týskland hartar Iran

Týska uttanríkisráðið kunngjørdi sunnukvøldið, at Frank-Walter Steinmeier, uttanríkisráðharri, hevði sent boð eftir iranska sendiharanum í Berlin og biðið hann koma á fund við seg í uttanríkisráðnum. Í kunngerðini stóð eisini, at Frank-Walter Steinmeier fordømdi ta harðligu viðferðina, sum mótmælisfólk í Teheran høvdu fingið frá myndugleikunum. Fleiri vilja vera við, at Mahmoud Ahmadinejad var ikki tann rætti vinnarin á forsetavalinum í Iran. Eygleiðarar siga tað vera serliga áhugavert, at Týskland mótmælir so harðliga, tí Týskland hevur rættiliga stóran samhandil við Iran.

# Guðrið leggur lag til summarið



**Leygarkvøldið bjóðaði Guðrið Hansdóttir til útgávukonsert í Sjónleikarhúsinum í Havn. Í fantastiskum formi vísti hon hvat kærleiki kann fyri tónleikin. Tað dapra The Cardigans ljóðið var so at siga burtur, og í staðin varð huglagið merkt av summari, við lættum tónum a la The Carpenters**

TÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Sjónleikarhúsið í Havn var leygarkvøldið karmur um eina av bestu konsertunum í longri tíð. Útgávukonsertin hjá Guðrið Hansdóttir var tann fullfíggjaða byrjanin til summarið, ið er í nánd. Her oysti Guðrið Hansdóttir av sínum summarligu tónum saman við ein vælsmurdari maskinu av Føroya bestu tónleikarum.

Tað var júst í Sjónleikarhúsinum fyri tveimum árum síðan, at yvirritaða hevði eina av sínum bestu konsertupplivingum nakrantíð. Tað var, tá Budam fylti pallin, og fekk alt húsið at klappa, trampa og syngja við til sín tónleik.

Leygarkvøldið gjørdi Guðrið honum bragdið eftir. Eftir upphitingina við Heiðrik á Heygum, fór teppið frá, og har stóð hon so løtt og summarlig í sínum tunna ljósareyða kjóla og sang I Defy, sum seinastu vikuna hevur verið í umfari í kringvarpinum. Við sær hevði hon 10 fólk, ið komu inn í litføgrum orkesturbúnum. Tey vóru Leivur Thomsen gittar, Rógvi á Rógvi trummur, Mikal Blak bass, Líggjas Olsen og Magnus Johannesen klaver og keyboard, Flóvin kór og gittar og Ása Wraae sang kór. Harafturat var Bernharður Wilkinson serligur gestur, tá hann spældi floytu á einum lagi, og Ólavur Olsen leikti trompet á einum. Tveir strúkarar vóru eisini partur av orkestrinum. Tóri Restorff spældi kontrabass og Angelika Nielsen spældi fiól.



### Forelskilsi gevur íblástur

Nógv hevur verið gjørt burturúr útgávukonsertini hjá Guðrið, og so gott sum hvør miðil hevur givið songkvinnuni ans. Í samrøðu við Sosialin fyrr í vár segði Guðrið, at hon síðan seinastu útgávu hevði funnið kærleikan, ið hon saknaði í arbeiðnum við Love is Dead, sum kom út í 2007. Tónleikurin var merktur av hesum sterku kenslum av sakni. Hon segði í vár, at hon helt ikki, at ein kundi gera tónleik um glað ting, men at hon so dyggiliga mátti eta síni egnu orð, tá hon ikki kundi nokta fyri stóra íblástrinum, hon fekk eftir at hava funnið kærleikan. Forelskilsi og gleði hava sett síni fingramerki á tónleikin hjá Guðrið, og slepti hon síni næstu útgávu á marknaðin 4. juni í ár. Síðan hava løgini Walk With Me, I Defy og føroyska lagið, Stjørnur, ið er yrking eftir Siggu Mariu Højgaard, og sum Guðrið Hansdóttir hevur sett lag til, verið í umfari í útvarpinum. Øll hesi løgini vóru einans betri at uppliva á konsert. Persónliga haldi eg, at Guðrið Hansdóttir ikki kann rista ljóðið av kvinnuligi røddini í The Carpenters av sær. So